# Punktumið varð sett í Vágum

**Veðrið argaði, men kongsfamiljan fekk hóast alt ein góðan dag í Vágum. Ferðin í Føroyum endaði við einum tíðindafundi, har forvitnu fjølmiðlafólkini fingu høvi at seta spurningar**

Veðrið var ikki av tí besta fyrrapartin hósdagin, tá ið kongsfamiljan á sínum seinasta degi í Føroyum vitjaði í Vágum.

Ætlanin var, at krúnprinsaparið skuldi fara í Mykines, men hesin partur av ferðini varð avlýstur, tí tað varð ikki mett ráðiligt at flúgva tey kongaligu út í tyrlu orsaka av vindi.

Dagurin byrjaði við móttøku í Sørvági, og síðani fór kongliga fylgið til Gásadals. Har var veðrið hálvvánaligt, men vitjanin eydnaðist fyri tað.

Kongsfamiljan vitjaði síðani bæði í Sandavági og í Miðvági, áðrenn ferðin í Føroyum endaði við einum tíðindafundi á Hotel Vágum.

Har fingu føroysku og útlendsku fjølmiðlafólkini høvi at spyrja teir spurningar, sum tey sótu inni við eftir teir fýra dagarnar í Føroyum. Spurt var um alt frá barsilsfarloyvi til politikk, og tey kongligu svaraðu sum frægast.

Tey søgdu seg verða fegin um ferðina í Føroyum, og Margretha drotning lovaði, at tað skuldu ikki ganga eins nógv ár til næstu Føroyaferðina, sum tað høvdu gingið til hesa ferðina.



*Í Sóljugarði í Sandavági vóru børnini errin av at fáa Margrethu og hini kongaligu á vitjan, og hesin drongurin hevði hug at fáa eitt prát við drotningina*



*Hesin hevði gjørt seg út við kongakrúnu, og tað riggaði hann bara væl við*



*Margretha og Heindrikur taka kurtisliga í hondina á vertunum í bygdaráðnum í Sandavági*



*Drotningin, prinsurin, krúnprinsurin og krúnprinsessan hava tikið sæti framman fyri øllum fjølmiðlafólkunum, sum hava fylgt teimum á Føroyaferðini. Spurningarnir til tey kongligu fór víða, og Margretha slapp eisini at svara spurningum um sína røðu í Norðurlandahúsinum, sum onkur helt var ov politisk*



*Tey bíða spent í Sandavági. Føroysku búnarnir vóru funnir fram til hátíðarligu løtuna*